## Skjálvtar ávirka vatnið

Síðani seinasta summar er Kleifarvatn, sum er á Reykjanesi í Íslandi, vaksið nógv, og jarðfrøðingar halda, at hetta hevur samband við broytingar niðri undir vatninum. Teir vísa á, at vatnið minkaði nógv aftan á nakrar jarðskjálvtar tann 17. juni í 2000. Tá varð hildið, at ein riva mundi vera komin í botnin á vatninum av skjálvtunum, og at vatn rann niður ígjøgnum rivuna. Nú verður hildið, at rivan er vorðin tøtt aftur, og at vatnið tí veksur aftur.



## Smyril mátti bíða

Táið Smyril kom úr Suðuroy fríggjamorgun og skuldi leggja at í Havnini, var so nógvur vindur, at hann fekk ikki lagt at beinanvegin. Tað fekk ferðafólkið kunning um umvegis hátalararnar. Hann lá tískil uttanfyri Molan í Havnini og bíðaði, men bíðitíðin var ikki so long, tí tað gingu einir 20 minuttir, áðrenn vindurin var minkaður so frægt, at tað var ráðiligt at leggja at. Havnarskrivstovan sigur, at vindurin var upp í 24 metrar um sekundið av vestri í einum grovum kavaælið, men tá ið ælið var av, minkaði vindurin eisini skjótt og tá eydnaðist Smyrli at leggja at.

# Siðamisbrot fyri landsrættin

**Ákæruvaldið hevur skotið ein dóm fyri siðamisbrot inn fyri landsrættin. 50-ára gamli maðurin fekk 8 mánaðir fongsul, hóast ákæruvaldið kravdi 15 mánaðir.**

RÆTTARMÁL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tá Føroya Rættur í desember dømdi ein 50-ára gamlan mann 8 mánaðir fongsul fyri at hava gjørt seg inn á tríggjar brøður í eitt tíggju ára skeið, var dómuriun nógv linari, enn ákæruvaldið kravdi.

Maðurin varð dømdur eftir paragraf 222, sum umrøður blygdanarskemd og ikki eftir paragrafunum 224 og 225, sum umrøða »anden seksuel omgang end samleje«.

Av tí at talan var um eina játtanarsak, varð ikki hildið neyðugt at innkalla dreingirnar sum vitni, men nú verður málið so tikið upp aftur í landsrættinum, og tá verður tað við øllum vitnum. Altso eisini við dreingjunum, sum vitnir.

Av tí at dómarin avgjørdi at nýta paragraf 222 sum grundarlag, var ein stórur partur av ákærunum móti elsta dreinginum fyrnaðar, og tí fekk hann heldur ikki eins stórt endurgjald sum yngru brøðurnir.

Ákæruvaldið vil hava mannin dømdan eftir paragrafunum 224 og 225, sum eisini gevur grundarlag fyri nógv strangari revsing, enn mildara paragraf 222 gevur.

Landsrætturin kemur til Føroya í mars, og tá kemur hetta málið fyri aftur.



*Ákæruvaldið hevur skotið eitt mál um siðamisbrot inn fyri landsrættin*

# Nýggjur kano-maður

**Ein breti er komin aftur í aftur, eftir at familja og vinir hildu, at hann gjørdi sjálvmorð fyri 15 árum síðani**

KANO-MAÐUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað vakti stóra undran, tá sonevndi kano-maðurin varð avdúkaður. Øll hildu annars, at hann var druknaður á einum kanotúri, men tað vísti seg, at vegna vána fíggjarligt skil, hevði hann valt ta loysnina.

Nú er so enn ein breti komin aftur í aftur, eftir at familja og vinir hildu hann vera deyðan av sjálvmorði fyri 15 árum síðani.

Tað eydnaðist honum kortini at fáa pensjón frá statinum undir følskum navni øll 15 árini.

Hann lat eftir sær eitt sjálvmorðsbræv umborð á einari ferju, og eftir hetta hildu øll mannin vera deyðan.

Eins og hjá kano-manninum, John Darwins, skavaði konan út yvir hann, og tað gjørdu tey fýra børnini eisini. Men hesum kundi elsta dótturin, Lorna, ikki liva vikð, og tí gjørdi hon av seinasta sunnudag at melda pápa sín til myndugleikarnar.

Konan greiddi vinum og familju frá, at hon hevði funnið sær ein nýggjan mann, men tað undraði, at hon ongantíð presenteraði hendan nýggja mannin fyri teimum.

Nú hevur so systur tann 71-ára gamla Walter Dominy funnið út av, at bróður hennara kortini ikki hevði gjørt av við seg fyri 15 árum síðani.

# Viðgongur siðamisbrot

**Ein 64-ára gamal maður viðgekk í dag í Føroya Rætti, at hann hevur misbrotið seg móti einum tá 13 ára gomlum dreingi**

SIÐAMISBROT
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í ákæruritinum sigur ákærin, at maðurin hevur følt upp á tann tá 13 ára gamla dreingin og hevur havt »oralsex« við honum.

Tann nú 64 ára gamli maðurin játtaði seg sekan, men vildi verða við, at hendingin fór fram undan 1. desember 1997, og tað hevur stóran týdning, tí júst hendan dag kom nýggj lóg í gildi, og er hendingin farin fram undan hesum degi, er málið fyrnað.

Tann nú 20 ára gamli maðurin er í Danmark, og tað verður neyðugt at avhoyra hann aftur um tíðspunktið, nær hendingin er farin fram.

Men at hendingin er farin fram so sum ákæruvaldið vil vera við, játtaði hin ákærdi, og tí er spurningurin so bara, um hendingin fór fram undan ella eftir 1. desember 1997.

Málið, sum var fyri í Føroya Rætti i morgun, er tí útsett.



*Spurningurin er, um siðamisbrotið fór fram undan ella eftir 1. desember 1997. Tað er heilt avgerandi, tí hendi hetta undan 1. desember, er málið fyrnað*